# Føroya-tornið verður hægsti bygningur í Íslandi

**Tað fer at ganga eitt gott ár aftrat til stásiligi bygningurin, sum eitt felag hjá Jákupi á Dul letur byggja í Kópavogi, verður liðugur. Hetta hevur kortini ikki hildið fólki frá at tryggja sær høli í bygninginum í góðari tíð. Bygningurin verður í 20 hæddum og millum íslendingar ber hann navnið ”Færeyja-turninn”!**

HANDILSLÍV
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kópavogur:** Tá umboð fyri Sosialin herfyri vitjaði í Íslandi, var hesin grannabýur Reykjavíkar sjálvandi ein partur av vitjanini.

Eitt av feløgunum hjá kenda havnarmanninum í Íslandi, Smáratorg letur nevniliga her byggja ein stóran, ella rættari høgan bygning sum íalt er 80 metrar høgur.

Bygningurin er ætlaður at hýsa bæði skrivstovum, handlum og øðrum virksemi, møguliga eisini einum hotelli.

Hetta er samstundis hægsti bygningur í Íslandi: Hann er í roynd og veru seks metrar hægri enn høga Hallgrímskirkjan í íslendska høvuðsstaðnum.



*- Grannarnir óttaðust – kortini grundleyst – fyri at tornið fór at geva teimum skugga fyri sólini. Men so var ikki*



*Agnes Geirsdóttir hevur arbeitt nógv saman við Jákupi á Dul. – Hann er fullur í góðum hugskotum, sigur hon*

- Hóast bert grundin er klár í løtuni, hevur áhugin fyri byggingini verið sera stórur.

- Í roynd og veru eru flestu hæddirnar longu umbidnar, sigur Agnes Geirsdóttir, fyritaksstjóri í Smáratorg.

Vit hittu hana ein týsdag fyri góðum mánaði síðani á skrivstovu hennara í Reykjavík.

Fáar metrar frá henni arbeiðir ein annar føroyingur somuleiðis fyri Jákup á Dul: Skopuningurin Niels Stórá, sum vit skiftu orð við herfyri.

Arbeiðið hjá Nielsi var m.a. at skapa møguleikar fyri at virksemið hjá fyritøkuni kundi víðkast til Baltalond og eitt nú Rumenien og Bulgarien.

### Nógv hugskot

Sum flestum kunnugt eigur Jákup á Dul í dag fleiri handlar kring allan heimin. Umframt áðurnevnda bygning í Kópavogi eru eisini størri byggiætlanir á veg í Selfossi og Keflavík. Hinvegin so man ætlanin við Stórutjørn í Havn vera flestum kunnug.

Tá vit vitjaðu í Reykjavík í farna mánaði vóru tey í ferð við at fyrireika enn eitt stig á leiðini út í heim: Fáar dagar seinni skuldi áðurnevndi Niels avstað til Rumenien, har teir vóru komnir væl áleiðis við at lata upp fyrsta handilin í landinum seinni í ár.

Hetta var í einum grannabýi við grannalandið Ungarn, og var hesin handilin - í somu familju sum okkara Skemmu-handil í Havn - bert ein av væntandi fleiri í hesum økinum.

Talið av handlum, sum feløgini hjá Jákupi í dag ráða yvir, man fara at tátta í teir hundrað. Og tá er greitt, at hetta er alt ov nógv hjá einum einstøkum manni at halda skil á.

Honum hevur tí eydnast at fáa fatur á góðum fólki og fólki við drúgvum royndum at standa fyri hesum virkseminum heima í Íslandi og úti í heimi.

Ein teirra er áðurnevnda Agnes Geirsdóttir. Um stjóra sín, Jákup sigur hon soleiðis:

- Eg havi arbeitt saman við honum í nógv ár, og eg má bara viðganga, at hann